# Heilsumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 10-01-2022 |
| Mál nr.: | 22/11593-9 |
| Málsviðgjørt: | RM |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

## Uppskot til

## Ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar

## Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om ændring af lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet

(Regulering og forrentning af erstatnings- og godtgørelsesbeløb)

Mælt verður ríkismyndugleikunum til at seta í gildi fyri Føroyar niðanfyristandandi uppskot um anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om ændring af lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet.

### Forslag til

### Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om ændring af lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet

(Regulering og forrentning af erstatnings- og godtgørelsesbeløb)

VI MARGRETHE DEN ANDEN, af Guds Nåde Danmarks Dronning, gør vitterligt:

I medfør af § 3[1] i lov nr. 909 af 21. juni 2022 om ændring af lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet, bestemmes:

[1] Bestemmelsen har følgende ordlyd: "Loven gælder ikke for Færøerne og Grønland, men kan ved kongelig anordning sættes helt eller delvis i kraft for Færøerne med de ændringer, som de færøske forhold tilsiger."

**§ 1**

I lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet, som sat i kraft for Færøerne ved kongelig anordning nr. 1248 af 19. december 2011, som ændret ved anordning nr. 2233 af 29. december 2020, foretages følgende ændringer:

**1.** I *§ 24, stk. 1,* ændres »jf. dog § 24 a« til: »jf. dog §§ 24 a-24 c«.

**2.** *§ 24 a, stk. 5-7,* ophæves.

**3.** Efter *§ 24 a* indsættes:

**»§ 24 b.** Erstatnings- og godtgørelsesbeløb efter § 3, § 4, stk. 1, § 6, stk. 2, § 8, § 13, stk. 1, 2. pkt., og § 14 a i den for Færøerne gældende lov om erstatningsansvar, der tilkendes efter reglerne i kapitel 3-4 a, reguleres efter reglerne i § 15, stk. 1, i den for Færøerne gældende lov om erstatningsansvar og fastsættes på grundlag af de regulerede beløb, der er gældende på afgørelsestidspunktet.

*Stk. 2.* Årslønnen efter § 7 i den for Færøerne glædende lov om erstatningsansvar og erstatningen efter § 14 i den for Færøerne gældende lov om erstatningsansvar, der tilkendes efter reglerne i kapitel 3-4 a, reguleres efter reglerne i § 15, stk. 1, i den for Færøerne gældende lov om erstatningsansvar i perioden mellem skadens indtræden og afgørelsestidspunktet.

*Stk. 3.* Erstatnings- og godtgørelsesbeløb efter §§ 1, 2 og 12 i den for Færøerne gældende lov om erstatningsansvar, der tilkendes efter reglerne i kapitel 3-4 a, reguleres efter reglerne i § 15, stk. 1, 1. pkt., i den for Færøerne gældende lov om erstatningsansvar og fastsættes på grundlag af de regulerede beløb, der er gældende på afgørelsestidspunktet. Det regulerede beløb afrundes til nærmeste med 5 delelige kronebeløb.

*Stk. 4.* Godtgørelse efter § 24 a fastsættes på baggrund af det beløb, der efter § 24 a, stk. 4, er gældende på afgørelsestidspunktet.

**§ 24 c.** Udbetales erstatning og godtgørelse senere end 5 uger efter tidspunktet for afgørelsen om tilkendelse af erstatning og godtgørelse, forrentes beløbet fra afgørelsestidspunktet, til betaling sker med en årlig rente svarende til renten i henhold til den for Færøerne gældende rentelovs § 5.«

**4.** I *§ 46 a* ændres »§ 24 a« til: »§§ 24 a-24 c«.

**§ 2**

Anordningen træder i kraft dagen efter bekendtgørelse i Kunngerðablaðið B.

*Givet på [placering], den [dato]*

Under Vor Kongelige Hånd og Segl

MARGRETHE R.

/ Sophie Løhde

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Í nógv ár hevur Patienterstatningen nýtt somu mannagongd, tá tey hava viðgjørt endurgjaldsmál.

Endurgjaldsmálini verða viðgjørd í tveimum. Fyrsta stig er at kannað, hvørt viðkomandi borgari hevur rætt til endurgjald eftir lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet. Hevur borgarin rætt til endurgjald sambært lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet, verður farið víðari til næsta stig í viðgerðini. Í næsta stigi av viðgerðini, verður borgarin vanliga biðin um ymiskar upplýsingar, t.d. upplýsingar um útreiðslur í sambandi við skaðan og mista inntøku, ið Patienterstatningen hevur tørv á, fyri at kunna áseta støddina av endurgjaldinum. Støddin á endurgjaldinum verður ásett við støði í Endurgjaldslógini (Erstatningsansvarsloven). Mannagongdin hevur verið, at renta verður roknað 1 mánað eftir at Patienterstatningen hevði móttikið viðkomandi upplýsingar frá borgaranum.

Tann 4. desembur 2020, feldi Hægsti rættur dóm (U2021.1058/2) hesum viðvíkjandi og staðfesti, at nýtta mannagongd til renturokning, ikki hevði heimild í lógini. Sambært Hægsta rætti skal renta tilskrivast 1. mánað eftir at Patienterstatningen hevði móttikið nøktandi upplýsingar til at kunna avgera, hvørt borgarin hevur rætt til endurgjald, og tískil í prinsippinum kann taka avgerð í málinum.

Dómurin inniber meirútreiðslur fyri skaðavaldara, somuleiðis sum hetta krevur nógv størri arbeiðsorku hjá Patienterstatningen, tá málini skulu viðgerast.

Í kjalarvørrinum av hægstarættardóminum, hevur Fólkatingið samtykt eina broytingarlóg, ið inniber, at renta skal tilskrivast endurgjaldsupphæddini, um so er, at endurgjaldið ikki er goldið í seinasta lagi 5 vikur eftir at Patienterstatningen hevur tikið avgerð í málinum. Í hesum føri skal rentan roknast frá avgerðartíðspunktinum.

Patienterstatningen hevur heitt á Heilsumálaráðið um at broyta føroysku lógina soleiðis, at hon samsvarar við donsku lógina.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi kongliga fyriskipan er: Anordning nr. 1248 frá 19. desember 2011 om ikrafttræden for Færøerne af lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet, sum broytt við anordning nr. 2233 frá 29. desember 2020

Galdandi fyriskipan ásetir,  at sjúklingar, ið fáa einhvønn skaða í føroyska heilsuverkinum, ella avvarðandi teirra, hava møguleika fyri at søkja um endurgjald sambært reglunum í lóg um klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet.

Sambært lógini er tað Patienterstatningen, ið viðgerð og tekur avgerð um endurgjald skal veitast. Støddin á endurgjaldinum verður ásett við støði í endurgjaldslógini (Erstatningsansvarsloven).

Endurgjald verður veitt fyri heilsuútreiðslur og aðrar útreiðslur, ið viðkomandi hevur havt orsaka av skaðanum, mista arbeiðsinntøku, mistan arbeiðsførleika, tort og sviða og varandi mein.

Um so er, at tann sum hevur fingið skaða, ið er fevndur av lógini, doyr orsaka skaðanum, hava tey avvarðandi rætt til endurgjald fyri mistan forsyrgjara og útreiðslur í standast av eini jarðarferð.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at dagføra kongligu fyriskipanina soleiðis, at føroysku endurgjaldsmálini verða renturokna á sama hátt sum líknandi donsk mál, og at tann føroyska lóggávan á økinum samsvarar við danska lóggávu.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Lógarbroytingin í donsku lógini snýr seg um at áseta reglur, soleiðis at tað er greitt ásett, hvussu endurgjøldini skulu renturoknast. Hetta verður gjørt orsaka av, at hæstarættardómurin frá 2020 staðfesti, at nýtta mannagongdin hjá Patienterstatningen at renturokna endurgjøldini, ikki hevði heimild í lóg. Dómurin viðførdi, at renturokningin varð sera umsitingarliga krevjandi og væntandi fór viðgerðartíðin at verða munandi longri enn higartil. Í Danmark ynskti man ikki, at viðgerðartíðin skuldi leingjast munandi, samstundis sum man vildi tryggja, at borgarin ikki fekk eitt fíggjarligt tap grunda á, at lógin varð broytt. Við hesum uppskotinum væntar man, at rentuútgjøldini verða áleið tey somu sum áðrenn lógarbroytingina.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Ríkislógartilmælið hevur verið til ummælis hjá fleiri hoyringspørtum. Teir eru: Sjúkrahúsverkið, Heilsutrygd, Sjúklingaráðið, Fólkaheilsustýrið, Landsapotekarin, Blái krossur, Heilbrigdi, Frælsi, Læknafelag Føroya, Serlæknafelag Føroya, Felagið fyri Yngri læknar, Kommunulæknafelag Føroya, Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, Ergoterapeutefelagið, Fysioterapeutfelag Føroya, Føroya Tannlæknafelag, Landslæknin, Krabbameinsfelagið og Megd.

Uppskotið hevur eisini verið til almenna hoyring á ummælisportalinum hjá landsstýrinum og á heimasíðuni hjá Heilsumálaráðnum.

Umframt hetta hevur Sundhedsministeriet sent kongaligu fyriskipanina til ummælis hjá Patienterstatningen.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Mett verður, at rentuútreiðslurnar verða væl hægri, um so er, at lógin ikki verður broytt. Sundhedsministeriet hevur í sínum lógararbeiði lagt seg eftir, at broytingin ikki skuldi hava fíggjarligar avleiðingar við sær, hvørki fyri landið ella teir borgarar, ið hava rætt til endurgjald. Hetta inniber, at rentuútreiðslurnar væntandi verða áleið tær somu sum áðrenn hægstarættardómin frá 2020.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið er við til at gera umsitingina í Heilsumálaráðnum léttari. Mett verður, at umsitingin av endurgjaldsmálum kemur at veksa munandi uttan lógarbroytingina.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri millumtjóðarsáttmálar á økinum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri millumtjóðarsáttmálar.

### 2.9. Markaforðingar

Mett verður ikki, at kendar markaforðingar eru á økinum.

### 2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv

Uppskotið hevur ikki nakra revsiásetingar.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur onga áseting, ið heimilar at áseta gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Uppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Uppskotið leggur onga heimild til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur aðrar avleiðingar.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Víst verður til serligu viðmerkingarnar í niðanfyristandandi danska lógaruppskotinum, ið somuleiðis verður lagt við sum fylgiskjal til hetta ríkislógartilmælið:

Lov nr. 909 af 21 juni 2022 om ændring af lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet: Folketingstidende 2021-2022, Tillæg A, L 147 som fremsat.

Lov nr. 909 af 21 juni 2022 om ændring af lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet: Folketingstidende 2021-2022, Tillæg B, L 147 som fremsat.

Lov nr. 909 af 21 juni 2022 om ændring af lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet: Folketingstidende 2021-2022, Tillæg H, L 147c som fremsat.

Heilsumálaráðið, tann 10. januar 2023.

**Margit Stórá**
landsstýrismaður

/ Turid Arge

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: "Udkast til anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om ændring af lov om klage- og erstatningsadgang inden for sundhedsvæsenet"
Fylgiskjal 2: Javntekstur
Fylgiskjal 3: Hoyringssvar
Fylgiskjal 4: Donsku lógaruppskotini nevnd undir punkt 3.1. omanfyri